LM-099/2023

Fylgiskjal 44

Hoyringskriv til lógaruppskotið um Burðardygga ferðavinnu

Uppskotið er í stóran mun fokuserað uppá at leggja trupulleikan hjá landstýrinum og lóggevandi valdinum út til kommunurnar at umsita.
Í øllum hesum, er tað serliga eitt sum Eysturkommuna vil vísa á. Tað er ordingin "Kommunan SKAL" Her verður álagt kommununum at gera eina ferðavinnuætlan, at reka ferðavinnuna eftir, umframt at røkja farleiðir og gøtur. Eitt er, at tørvurin á at gera hesar gøtur og at halda farleiðirnar uppdateraðar, er stórur. Men hesin verður nógv best røktur, um ánarin ella festarin av haganum avgreiðir hesi viðurskiftini.

Heldur metur Eysturkommuna at ferðavinnan er best skipa hjá teimum aktørunum ið fáast við ferðavinnu í dag. Tað eru hesi ið best kunnu meta um tørvir og best kunnu seta út í kortið hvussu ein ferðavinna í lokala økinum kann skipast.

Ein kommuna hevur í stóran mun ábyrgd av at skipa fyri, at tað er møguligt hjá hesum ymisku at fáast við tað virksemi sum ynski er um. Her er talan um eina meira yvirskipaða uppgávu, og ikki eina útgreinaða og álagda uppgávu sum uppskotið leggur upp til. Kommunan skal undir ongum umstøðum reka ferðavinnu. Men heldur stimbra teimum privatu aktørunum ið at fara undir arbeiði.

Hin peningaliga samsýningin ið uppskotið leggur upp til kann uppá ongan hátt viga upp ímóti tí kostnaði sum væntast standa av at viðlíkahalda bygdagøtur, sniðgøtur og annað ið er knýtt at ferðavinnuni. 150 kr frá hvørjum ferðafólki, at býta ímillum kommunur, ánara og bygd. Sum eftir uppskotinum verður deilt út eftir einari GPS stýring, kemur í bestan mun at geva kommununum eyka rakstur. Hetta tí at umbidna arbeiði ið uppskotið leggur upp til, mestsum við vissu útlogysir eitt starvsfólk.
At stýra peningaliga streyminum við GPS og telefonmastra triangulering vil ikki geva eitt rætt býtið. Tí ringt er at tryggja at peningurin tá verður býttur út eftir røttum leisti. Og hvussu skulu tær 150 kr frá viðkomandi ferðafólki forsvara tað gongd og slit ið ferðafólki hevur við sær, um alt landi. Tá kostnaðurin av at gera tílíkar gøtur fyri kommunur er tvífalt ella kanska trífalt so stórur sum tá privati eigarin ger gøtuna.

Uppskotið kennist verða stýrt nógv av ferðavinnu aktørum ið hava sítt dagliga virkið í meginøkinum/Tórshavn. Tað gevur øðrum kommunum grundarlag at viðmerkja hví kommunurnar uttanfyri Havnina nú skulu skipa eina ferðavinnu, fyri at Visit Faroe Islands skal hava møguleika at senda ferðafólk runt um allar bygdjarnar. Ókeypis.

Í dag eru ein rúgva av vælskipaðum ferðavinnu tilboðum kring landið. Og við hesum uppskotinum fer ein stórur partur av grundarlagnum hjá virkandi aktørum. Tá verður alt litið upp í hendurnar á kommununum. Og skulu tær tá reka ferðavinnuna. Fyri at endurtaka, so er tað uppgávan hjá kommununi at syrgja fyri at tað er møguligt hjá teimum ymisku aktørunum at reka sítt virksemi. Ikki at reka virksemið í kapping við aktørarnar.

Eysturkommuna vil tí við hesum heita á landstýrismannin um at taka uppskotið til nýggja viðger, ella heilt at taka tað aftur. Tí her er talan um eitt inntriv í kommunala kassan, sum undir ongum umstøðum fær nøktandi endurgjald av ferðaavgjaldinum.

Vegna Eysturkommunu
Per Martin Gregersen
borgarstjóri